**Býráðsfundur**

# Fundarinnkalling

**Dato:** 14. november 2024 **Kl.** 17:30
**Stað:** Býráðssalurin

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 268/24 | 24/08884-1 | Skipan av valbólkum | 2 |
| 269/24 | 24/08885-1 | Val av borgarstjóra | 3 |
| 270/24 | 24/08886-1 | Val av 1. og 2. varaborgarstjóra | 4 |
| 271/24 | 24/08887-1 | Val av 5 limum og tiltakslimum til fíggjarnevndina | 5 |
| 272/24 | 24/08888-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í byggi- og býarskipanarnevndina | 6 |
| 273/24 | 24/08889-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í teknisku nevnd | 7 |
| 274/24 | 24/08890-1 | Val av 5 limum og tiltakslimum í náttúru- og umhvørvisnevndina | 8 |
| 275/24 | 24/08891-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í mentamálanevndina | 9 |
| 276/24 | 24/08892-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í trivnaðarnevndina | 10 |
| 277/24 | 24/08895-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í heilsu- og eldranevndini | 11 |
| 278/24 | 24/08897-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í havnanevndina | 12 |
| 279/24 | 24/08898-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í vinnunevndina | 13 |
| 280/24 | 24/08893-1 | Val av tilbúgvingarnevnd | 14 |
| 281/24 | 24/08894-1 | Val av einum limi og tiltakslimi í SEV-nevndina | 15 |
| 282/24 | 24/08913-1 | Val av 3 limum og einum tiltakslimi í P/f Fjarhitafelagið | 16 |

**Til viðgerðar**

## 268/24 Skipan av valbólkum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.11.2024 | 268/24 | 24/08884-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 3 í kommunustýrislógini er ásett:

Við lutfalsvali í hesi lóg verður sipað til ein valhátt, har kommunustýrislimir frammanundan boða borgarstjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.

Stk. 2. Limatalið í hvørjum bólki sær verður skift sundur við 1, 2, 3 o.s.fr. Býtingartalið, sum tá kemur fram, ásetir ta raðfylgju, ið hvør bólkur kann velja sítt umboð.

Stk. 3. Eru tvey ella fleiri býtingartøl líka stór, verður raðfylgjan funnin við lutakasti, sum borgarstjórin skipar fyri.

Stk. 4. Tá ið avgjørt er, hvussu mong umboð hvør bólkur skal hava, eiga bólkarnir sum skjótast at boða borgarstjóranum frá, hvør umboðar hvønn bólkin.

Stk. 5. Sigur ein bólkur frá sær rættin at seta eitt ella fleiri umboð, verða teir leysu sessirnir býttir ímillum hinar bólkarnar eftir stk.1-3

**Tilmæli:** Kommunustjórin mælir býráðslimum til at boða frá valbólkum.

## 269/24 Val av borgarstjóra

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.11.2024 | 269/24 | 24/08885-1 |

**Málslýsing**:
Sambært § 6 í kommunustýrislógini er ásett:

“Kommunustýrislimur hevur skyldu at lata seg velja til borgarstjóra, varaborgarstjóra, nevndarlim ella umboð, umframt at gera aðrar kommunalar uppgávur, sum kommunustýrið áleggur honum.

Stk. 2. Val av borgarstjóra hevur gildi alt valskeiðið. Borgarstjórin verður valdur millum kommunustýrislimirnar eftir meirilutavalháttinum sambært § 2.”

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at býráðið velur borgarstjóra.

## 270/24 Val av 1. og 2. varaborgarstjóra

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.11.2024 | 270/24 | 24/08886-1 |

**Málslýsing:**

Sambært § 6 stk. 3 í kommunustýrislógini er ásett:

Varaborgarstjórin verður valdur millum kommunustýrislimirnar eftir meirilutavalháttinum sambært § 2. Varaborgarstjórin er í borgarstjórans stað, tá hesum berst frá, sí tó § 24, stk. 2. Ásetir kommunustýrisskipanin, at 1. og 2. varaborgarstjóri skulu verða valdir, fer valið fram undir einum eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

Sambært § 2 í kommunustýrisskipanini er ásett:
1.petti. Samsvarandi reglunum í kommunustýrislógini velur býráðið við meirilutavali ein borgarstjóra fyri alt valskeið býráðsins. Borgarstjórastarvið er fulltíðarstarv. Eisini velur býráðið við lutfalsvali ein varaborgarstjóra og ein 2. varaborgarstjóra.

Lutfalsval.

**Tilmæli**: Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 1. og 2. varaborgarstjóra.

# <u>271/24 Val av 5 limum og tiltakslimum til fíggjarnevndina</u>

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.11.2024 | 271/24 | 24/08887-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 28 og § 38 í kommunustýrislógini er ásett:

§ 28 Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt

§ 28 stk 2 ásetir:

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

§ 38 Fíggjarnevndin tekur sær av beinleiðis umsitingini av málum, ið víðvíkja kassa- og roknskaparverki og lønar- og starvsfólkaviðurskiftum kommununar. Borgarstjórin er nevndarformaður.

*Stk. 2.* Fíggjarnevndin samskipar og fylgir við fíggjarligu og fyrisitingarligu viðurskiftunum innan tað kommunala fyrisitingarøkið.

Viðvíkjandi fíggjarnevndini er ásett í **§14** í kommunustýrisskipanini at:

**1. petti.** Í fíggjarnevndini situr borgarstjórin, ið er nevndarformaður, og 4 aðrir býráðslimir. Fíggjarnevndin fyrisitur tey málsøki, sum løgd eru til hana sambært kapittul 8 í kommunustýrislógini.

**2. petti.** Fíggjarnevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Fíggjarviðurskifti
2. Starvsfólkaviðurskifti
3. Ognir kommununar
4. Trygging av virðum hjá kommununi
5. Leigumál
6. Sløkkiliðið
7. Verkstaðin
8. Kommunuplanur
9. Interkommunalir felagsskapir
10. Yvirskipað mál sum bústaðarfígging, gransking v.m.

**3. petti.** Fíggjarnevndin fyrisitur mál viðvíkjandi burturleigu av ognum í minni enn fimm ár. Nevndin sendir býráðnum tilráðing um keyp ella sølu av føstum ognum, veðseting og um burturleigu í meira enn fimm ár av ognum kommununnar.

**4. petti.** Øll mál, ið snúgva seg um fígging, skulu - áðrenn tey verða løgd fyri býráðið til samtyktar - hava verið til ummælis hjá fíggjarnevndini.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 4 limir til fíggjarnevndina, borgarstjórin er føddur formaður í nevndini. Harumframt, at býráðið velur 5 tiltakslimir.

# 272/24 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í byggi- og býarskipanarnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.11.2024 | 272/24 | 24/08888-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29.** Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

*Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Viðvíkjandi byggi- og býarskipanarnevnini er ásett í **§ 25** í kommunustýrisskipanini at:

**1. petti.** Byggi og býarskipanarnevndin hevur 5 limir.
Nevndin fyrisitur øll mál, ið sambært byggilóggávu og lóg um býarskipanir og byggisamtyktir eru løgd undir býráðið.

**2. petti.** Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Býarskipan og byggisamtyktir
2. Útstykkingar
3. Byggimál
4. Lendismál
5. Kirkjugarðar
6. Bygningsrakstur og -viðlíkahald av øllum kommunalum bygningum og anleggum eftir ásettari mannagongd
7. Fríðkan (viðarlundir, spælipláss, gøtur)
8. Áir, veitir og jarðarognir, tað veri seg traðarognir, urtagarðs- og onnur jarðarstykki.

**3. petti.** Nevndin fyrisitur allar umsóknir um bygging og sundurluting og viðger hesar sambært galdandi lógum, reglugerðum og fyriskipanum og ansar eftir, at øll bygging er í samsvari við hesi.

**4. petti.** Nevndin sendir býráðnum um fíggjarnevndina tilráðing um keyp ella sølu av føstum ognum og um burturleigu í meira enn fimm ár av teimum ognum, sum nevndin útinnir viðlíkahaldi av. Eisini sendir hon eftir áheitan fíggjarnevndini tilmæli viðvíkjandi burturleigu av ognum.

**5. petti.** Nevndin hevur eftirlit við, at gingið verður eftir teimum servituttum og deklaratiónum, sum álagdar eru til frama fyri kommununa.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina umframt 5 tiltakslimir.

# 273/24 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í teknisku nevnd

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.11.2024 | 273/24 | 24/08889-1 |

**Málslýsing:**

Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

Stk. 2. Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

§ 29. Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

Stk. 2. Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Víðvíkjandi teknisku nevnd er ásett í **§ 24** í kommunustýrisskipanini at:

**1. petti.** Tekniska nevnd hevur 5 limir.
Nevndin ansar eftir, at tær viðtøkur og reglugerðir, sum galda fyri málsøki nevndarinnar, verða fylgdar.

**2. petti**. Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Bussleiðin
2. Vatnveiting og vatngóðska
3. Kloakkir og yvirflatuvatn
4. Vegir og ferðslumál
5. Gøtuljós
6. Onnur teknisk viðurskifti, ið ikki hoyra undir aðra nevnd

Nevndin skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi.

**3. petti**. Nevndin hevur tekniskt eftirlit við almennum plássum, vegum, kloakkum, reinsiverkum, almennum nátthúsum o.ø.

**4. petti**. Nevndin fyriskipar, at navnaskelti verða sett upp á gøtum, vegum, torgum, støðum o.ø. og hevur í øllum førum eftirlit við, at fyriskipanirnar í vegareglugerðini um gerð og yvirtøkur av gøtum og vegum verða hildnar.

**5. petti.** Skylda kommununnar at reinsa gøtur, vegir og pláss (torg) er løgd til nevndina, og leiðir og útinnir hon hesi arbeiði - eisini tá talan er um kavagrevstur og at beina fyri burturkasti frá hesum arbeiðum.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina umframt 5 tiltakslimir.

## 274/24 Val av 5 limum og tiltakslimum í náttúru- og umhvørvisnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.11.2024 | 274/24 | 24/08890-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28**. Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

Stk. 2. Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29.** Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

Stk. 2. Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Viðvíkjandi náttúru og umhvørvisnevndini er ásett í **§ 26** í kommunustýrisskipanini at:

**1. petti.** Umhvørvisnevndin hevur 5 limir.
Nevndin fyrisitur mál, ið sambært lóggávuni, kunngerðum og reglum um umhvørvisvernd og fyriskipanum, eru løgd undir kommununa, og skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi.

**2. petti.** Nevndin fyrisitur hesi málsøki:

1. Brennistøðin
2. Ruskinnsavnanin
3. Jarnmóttøku kemikaliur, spilloljuslamsúgving, rottangatøming, tyrving o.a.
4. Náttúru og umhvørvi
5. Frílendi
6. Framtíðar orka
7. Umhvørvismál
8. Umhvørvisátøk so sum umhvørvisvika v.m.

Nevndin skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina umframt 5 tiltakslimir.

# <u>275/24 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í mentamálanevndina</u>

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.11.2024 | 275/24 | 24/08891-1 |

**Málslýsing:**

Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

Stk. 2. Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29**. Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

Stk. 2. Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Viðvíkjandi mentamálanevndini er ásett í **§ 29** í kommunustýrisskipanini at:

**1. petti.** Mentamálanevndin hevur 5 limir.

**2. petti**. Nevndin fyrisitur hesi málsøki:

1. Dagstovnaøkið, harundir frítíðarskúlar og ungdómsvirksemi, námsfrøðiliga ráðgeving og tilboð til børn við serligum tørvi
2. Musikkskúli
3. Kvøldskúli
4. Býarbókasavn
5. Býarsavn
6. Mentanarhøli
7. Stuðulsskipanir
8. Svimjihøll
9. Ítróttaranlegg
10. Onnur mál av mentunarligum týdningi í kommununi.

**3. petti.** Nevndin gevur viðmæli til býráðið í málum viðvíkjandi nøvnum á nýggjum gøtum, vegum o.ø. sambært tilmæli frá serstakari nevnd, bólki e.ø.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina umframt 5 tiltakslimir.

## 276/24 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í trivnaðarnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.11.2024 | 276/24 | 24/08892-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

Stk. 2. Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29.** Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

Stk. 2. Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Viðvíkjandi trinvaðarnevndini er ásett í **§ 27 í** kommunustýrisskipanini at:

**1. petti.** Trivnaðarnevndin hevur 5 limir.
Nevndin tekur avgerð í málum, ið sambært lóggávu eru løgd til býráðið ella eina sosiala nevnd, í tann mun fyriskipaninar í lóggávuni ikki eru til hindurs fyri hesum. Nevndin fyrisitur eisini undirvísingarmál innan fólkaskúlaøkið.

**2. petti**. Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Barnatannrøkt
2. Barnavernd
3. Familjupolitikk
4. Fólkaheilsa
5. Integratión
6. Fólkaskúli, harundir forskúli

**3. petti.** Nevndin fyrisitur ávísar stovnar hjá kommununi, ið ætlaðir eru til sosial- og heilsulig endamál, fólkaskúlar og kommunalar íbúðir.

**4. petti.** Nevndin fyrisitur lógarbundar játtanir til skúlabarnaflutning, lærlingaútreiðslur, almennan serskúla, eftirskúlagjøld v.m.
Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 5 limir í nevndina umframt 5 tiltakslimir.

## 277/24 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í heilsu- og eldranevndini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.11.2024 | 277/24 | 24/08895-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

*Stk. 2*. Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29.** Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.
Stk. 2. Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Viðvíkjandi heilsu- og eldranevndini er ásett í **§ 28** í kommunustýrisskipanini at:

**1. petti.** Heilsu- og eldranevndin hevur 5 limir.
Nevndin tekur avgerð í málum, ið sambært lóggávu eru løgd til býráðið í tann mun fyriskipanirnar í lóggávuni ikki eru til hindurs fyri hesum.

**2. petti** Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Heilsu- og umsorganartænastuna, herundir røktarheimspláss, umlættingar- og rehabiliteringspláss, heimatænasta og heimasjúkrarøkt, dag- og kvøldtilhald, venjingar umframt aðrar tænastur á eldraøkinum.
2. Kommunulæknaskipan
3. Heilsufrøðiskipan

**3. petti**. Nevndin fyrisitur heilsu- og umsorganartænastuna og stovnar undir hesi. Nevndin fyrisitur eisini hvíldarheimið Naina, serflutningsskipanina og tilboð til heimleys.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina umframt 5 tiltakslimir

## 278/24 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í havnanevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.11.2024 | 278/24 | 24/08897-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29.** Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

*Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Viðvíkjandi havnanevndini er ásett í **§ 30 í** kommunustýrisskipanini at:

**1. petti.** Havnanevndin hevur 5 limir

**2. petti.** Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Tórshavnar havn
2. Smábátahavnir
3. Vinnuvirksemið og vinnubygningar á havnaøkinum
4. Fiskivinna
5. Oljuvinna
6. Cruise/ferðamannaskip

**3. petti.** Nevndin fyrisitur bíðilistar til pláss í smábátahavnum og skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi.

**4. petti.** Nevndin fyrisitur býráðsins vegna peningaviðurskiftum og roknskaparhaldi hjá vinnuhavnum og smábátahavnum samsvarandi teimum til eina og hvørja tíð galdandi roknskaparreglum og reglum viðvíkjandi fyrisiting av havnum o.ø.

Roknskaparhaldið hjá vinnuhavnum og smábátahavnum skal haldast hvørt sær.

Loyvt er ikki at rinda møguligt hall av rakstri av smábátahavnum v.m. av inntøkum hjá vinnuhavnum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina umframt 5 tiltakslimir.

## 279/24 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í vinnunevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.11.2024 | 279/24 | 24/08898-1 |

**Málslýsing:**

Viðvíkjandi vinnunevndini er ásett í § 31 í kommunustýrisskipanini at:

**1. petti.** Undir fíggjarnevndini verður sett ein vinnunevnd við 5 kommunustýrislimum, ið skal viðgera vinnumál.

**2. petti.** Nevndin viðgerð og leggur fyri fíggjarnevndina mál, ið viðvíkja hesum málsøkjum:
1. Vinnuvirksemi og vinnubygningar, tó ikki á havnaøkinum
2. Vinnupolitikkur og vinnumál
3. Ferðavinna/cruisevinna
4. Handils- og tænastuvinnu
5. Vinnunýskipan
6. Vinnustrategi
7. Hýruvognsloyvi
8. Hugskotið
9. Stuðulsjáttanir á ferðavinnuøkinum

**3. petti.** Nevndin leggur síni tilmæli fyri fíggjarnevndina at bera víðari í skipanini.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í vinnunevndina umframt 5 tiltakslimir.

## 280/24 Val av tilbúgvingarnevnd

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.11.2024 | 280/24 | 24/08893-1 |

**Málslýsing:**
Viðvíkjandi tilbúgvingarnevndini er ásett í **§ 39** í kommunustýrisskipanini at:

**1. petti.**Tilbúgvingarnevndin hevur 5 limir.

Í Tilbúgvingarnevndini situr borgarstjórin, sum er formaður, brunaumsjónarmaðurin, eitt umboð fyri Føroya Landfúta og 2 aðrir limir, tilnevndir av kommunustýrinum.

**2. petti.** Nevndin fyrisitur kommunalu tilbúgvingina sambært løgtingslóg um tilbúgving og samsvari við galdandi reglugerðir og ársfíggjarætlan.

Siðvenja hevur verið, at 1. og 2. varaborgarstjóri, saman við borgarstjóranum, ið er føddur formaður, hava verið umboðað í nevndini.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 2 limir í tilbúgvingarnevndina.

# 281/24 Val av einum limi og tiltakslimi í SEV-nevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.11.2024 | 281/24 | 24/08894-1 |

**Málslýsing:**

4. grein

NEVNDIN

Stk. 1. Til at hava yvirstjórn í felagsins viðurskiftum verður á aðalfundinum vald ein nevndsambært stk. 2.

Stk. 2. Í nevndina verða valdir sjey limir soleiðis, at Vága, Streymoyar, Eysturoyar, Norðoya ogSandoyar sýslur hvør velja ein, Suðuroyggin ein og Tórshavnar kommuna einnevndarlim.

Valið fer fram á tann hátt, at limakommunurnar í hvørjum øki sær seta upp valevnir ogatkvøða um hesi.

Um nevndarlimur flytur úr økinum, har hann er valdur, tekur varalimurin við, og nýggjurvaralimur verður valdur.

Meirilutaval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja ein lim og ein tiltakslim í Sev-nevndina.

## 282/24 Val av 3 limum og einum tiltakslimi í P/f Fjarhitafelagið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.11.2024 | 282/24 | 24/08913-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 6 í viðtøkunum hjá P/F Fjarhitafelagnum er ásett:

“Í nevnd felagsins eru 6 limir.

Nevndarlimir verða valdir fyri 4 ár í senn, men kunnu afturveljast.
Valdir verða 2-3 tiltakslimir, sum taka sæti í nevndini, tí í ávísum nevndarlimi berst frá.”

Ognarluturin hjá Tórshavnar kommunu í felagnum merkir, at 3 limir skulu veljast av býráðnum í nevndina umframt ein tiltakslimur. Hinir 3 limirnir verða valdir av SEV.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 3 limir umframt 1 tiltakslim.